# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*14. apríl fingu Salmina A. og Teitur Poulsen henda fitta beiggjan. Hann vigaði 4520 g og var 56 cm langur.*

10. apríl fingu Lena í Buð og Eli Hansen, Klaksvík, eina dóttur.

14. apríl fingu Sunfríð Helgadóttir í Gong og Øystein Fossland, Karmøy, Noreg, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 3250 gr. Hon eitur Ranja.

14. apríl fingu Ragna Juul og Yasmani M. Cuario, Keypmannahavn, ein son. Hann var 48 cm langur og vigaði 2400 gr.

15. apríl fingu Marin Sigvaldsdóttir og Kristian R. Bláberg, Miðvági, ein son. Hann var 62 cm langur og vigaði 5200 gr.

17. apríl fingu Marianna Ole-Jacobsen og Gunnleif Mikkelsen, Hoyvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3375 gr.

17. apríl fingu Poula Dulavík Olsen og Arnhold Berg, Skála, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

17. apríl fingu Súsanna og Guttorm Joensen, Hoyvík, ein son. Hann vár 54 cm langur og vigðaði 4000 gr.

18. apríl fingu Malja Mouritsen og Helgi Leonson, Sørvági, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3700 gr.

18. apríl fingu Ragnhild G. Olsen, Vestmanna, og Høgni Juul, Funningi, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4120 gr.

18. apríl fingu Sóley Johannesen og Rúni Nolsøe, Odense, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3.500 gr.

19. apríl fingu Elin Akselsen og Tór-Ingar Akselsen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3600 gr.

19. apríl fingu Randi og Zacharis Thomassen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3910 gr.

20. apríl fingu Elin Hvidbro og Jákup Hansen, Klaksvík, ein son. Hann var 60 cm langur og vigaði 5000 gr.

21. apríl fingu Sunrid Lamhauge og Rógvi Fossdalsá, Rituvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3925 gr.

22. apríl fingu Majbrith og Hans Eli Reynskor, Sørvági, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.

22. apríl fingu Rannvá á Steig og Jónleif Johannesen, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm langur og vigaði 3400 gr.

# Broytt býarmynd





R.C. Effersøesgøta í Havn man vera ein tann trafikkeraða gøtan í Føroyum.

Ovara myndin er tikin í R.C. Efersøesgøtu í 1957 og tann niðara í 2005.

Tá Johan Simonsen (Johan í Hoyvík) í 1957 bygdi sær sethús í R.C. Effersøesgøtu, vóru ikki nógv hús í gøtuni. Húsini hjá Johan eru tey hvítu fremst á myndini. Á myndini eru eisini eini finsk typuhús. Tey fyrstu av hesum slagnum í Havn vórðu bygd í 1947.

Stóri kletturin, sum var framman fyri húsini hjá Johan Simonsen, varð sprongdur burtur, og í dag sæst ein vakurt bygdur grótgarður har sum steinurin var.

Leggið til merkis at nógv trøð eru komin hesi árini.

*Ovara myndin: Magnus Simonsen*
*Niðara myndin: Birgar Johannessen*

**Dagurin**

**26. apríl. Cletus**, deyður umleið ár 90. Cletus ella Anacletus var triði maður á pávastóli eftir Pætur.

**27. apríl. Ánanias**, deyður ár 375. Kristin munkur, sum varð tikin av døgum í Persia. Summir halda, at her er talan um tann Ánanias, sum er umtalaður í Ápostlasøguni 9, 10-19. Fríðrikur Petersen doyði hendan dagin í 1917.

**28. apríl Vitalis**. Dagurin í dag eitur Vitalis, deyður umleið 171. Rómverskur embætismaður, sum gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum.